


Nýggju skipini hjá Esvagt. Mynd: Havyard

# Esvagt byggir sergjørt vindmylluskip

**Jógvan Hugo Gardar**

21.08.2014 - 22:25

Oljan.fo

Danska fyritøkan Esvagt hevur bílagt skip sum eru sergjørd til at halda vindmyllur til havs viðlíka og annars at røkja myllurnar.

Vindmyllulundir á opnum havi gerst meir vanligt, og hesar skulu hava røkt. Tað er Havyard í Noregi sum byggir skipini. Kenneth Pettersen, stjóri í Havyard sigur í samrøðu við Sysla at tey ikki rættuliga vita hvussu stórur marknaðurin kann vera fyri hetta slagið av skipum, men at tey halda at hetta kann gerast spennandi.

Skrokkurin til tað fyrsta skipið kom til skipasmiðjuna í Leirvik á Stord í Noregi í farnu viku. Skrokkurin er bygdur í Turkalandi. Hetta er tað fyrra av tveimum skipum av hesum slagnum sum Esvagt í Esbjerg hevur bílagt.

Esvagt samstarvar við Siemens um at menna hesi skipini, og Havyard vónar at hetta er byrjanin til eina nýggja vinnu hjá teimum. Skipini minna um skip sum vit kenna frá oljuvinnuni, men eru sergjørd til vindmylluviðlíkahald.

Skipini hava serútgerð sum ger tað lætt at koma umborð á vindmyllurnar, og stórt goymslupláss er til eykalutir umborð. Skipini skulu eisini liggja gott í sjónum so lættari er at arbeiða.

Manningin hevur eisini ymiskar hentleikar sum biograf, venjingarrúm og rúm til spøl. Pláss verður fyri 40 tøkningum frá Siemens, umframt at skipini skulu hava eina manning uppá 20.

Tað fyrsta av skipunum skal latast Esvagt til jólar. Skrokkurin av systurskipinum kemur til Leirvik í september.